SJÚKRAHÚS VERKIÐ

# Klaksvíkar Sjúkrahús
# Sjúkrarøktarfrøðingar og heilsurøktarar til summarfrítíðarstørv

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingum og heilsurøktarum til fulltíðar og parttíðar frítíðaravloysarastørv í skiftandi vaktum á seingjardeildini í tíðarskeiðinum 01.06.2024 til og við 31.08.2024.

**Vit bjóða:**

- eitt ábyrgdarfult, avbjóðandi sjálvstøðugt og fjøltáttað starv
- vit hava fokus á toymisarbeiði, ynskja ein jaligan hugburð, sum ávirkar trivna og góða sjúklingagongd.

**Førleikar:**

- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur/heilsurøktari ella um tú ert lesandi
- dirvi, góð samstarvsevni og fleksibilitet
- fakligan áhuga innan økini
- eitt opið og jaligt sinni
- góðan telduførleika.

**Lønar- og setanartreytir** sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Um tú ynskir at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við deildarleiðara, Ingrid Petersen tlf. 265935, ella teldupost: ingpe@ks.fo

Umsókn, saman við avriti av prógvi og CV, skal sendast til: umsokn@ks.fo

**Umsóknarfreistin er 15.02.2024.**

*Á heimasíðu okkara www.ks.fo kanst tú lesa um okkara visjón, missión og strategimál undir leinkjuni "Sjúkrahúsið".*

*Sjúkrahúsverkið fevnir um tey trý sjúkrahúsini Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar sjúkrahús og Suðuroyar sjúkrahús. Okkara uppgáva er at veita øllum dygdargóðar heilsutænastur, ið fevna frá gitnaði til seinastu fráferð.*

SJÚKRAHÚS VERKIÐ

*Vit eru trý sjúkrahús, sum samskifta, virka og skapa eftir felags virðum. Í Sjúkrahúsverkinum vísa vit virðing fyri sjúklingunum, avvarðandi og starvsfólki, og miða altíð eftir at veita rættstundis sjúkugreinan og viðgerð við skipaðum sjúklingagongdum.*

*Sjúkrahúsverkið er eitt fjølbroytt arbeiðspláss, har virðini stev, áræði og flog, eru okkara kumpass, sum vit brúka í okkara yrki í gerandisdegnum. Í Sjúkrahúsverkinum starvast út við 1.200 starvsfólk innan 30 ymiskar fakbólkar.*

KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚS

Sjúkrahúsbrekka 1
FO-700 Klaksvík

Tel.: +298 45 45 45
ks@ks.fo

ks.fo